Jesus livir, Jesus livir   G-dur

G                    C               D            G
Jesus livir, Jesus livir og kann ikki broyta seg!
G                             C                  D          G
Meir enn vinir, heim og framtíð – Alt er Jesus fyri meg,
G                          D        D7                    G
Vegur, tá mær fjald er leiðin, Ljós á myrku vandaferð,
G                     C              D            G
Alt á jørð og alt í Himli – Alt í ævir Jesus er!

2/4. Burtur tí við sorg og iva, Óttafullu hví, farvæl!
Jesus elskar allar dagar, Eg í honum hvíla skal;
Hann, sum doyði, livir ævigt, Lyfti hans meg svíkja ei,
Hann, sum gav mær stað har uppi, Sigur ei á foldum nei!

3/4. Tí kann eg nú ikki stúra, Jesus hugsar jú um alt,
Gevur alt, sum mær kann tørva, Hjálpir mest, tá mest tað galt;
Hann, sum blómur letur grógva, Fuglin letur føði fá,
Honum vil eg lovsong bera, Hann í hvørji neyð veit ráð.

4/4. Navnið Jesus fái heiður Yvir hav og yvir fjøll!
Vit um hetta navnið tala, Bera boð um tað til øll.
Í teim høgu, ljósu høllum Hetta navnið lovsong fær,
Og á jørð í øllum songi Tað hin besti tónin var.

*R. E. Lyeween. ( V. Danielsen týddi).